

# Trygdin í norsku oljuvinnuni ongantíð verið betri

**Jógvan Hugo Gardar**

25.04.2015 - 15:56

Oljan.fo

Norska kolvetniseftirlitið, Petroleumstilsynet (Ptil), legði í gjár fram eina kanning sum vísir váðastøðið í norsku olju- og gassvinnuni. Niðurstøðan er at váðastøðið ongantíð hevur verið lægri enn tað er í dag.

- Hetta er eitt sera gott úrslit. Hendingar sum kundu gerast til álvarsligar vanlukkur hava ongantíð verið so fáar sum tær vóru í 2014. Harafturat vísir kanningin at talið á tí sum kann mennast til vanlukkur ongantíð hevur verið so lágt. Tað merkir at okkara trygdararbeivi eydnast, sigur Aud Nistov, virkandi stjóri fyri arbeiðsumhvørvi hjá felagsskapinum Norsk olje og gass.

Norsk olje og gass hevur í áravís arbeitt við at seta sjóneykuna á økir har arbeiðast skal meir við trygdini. Talan er um trý høvuðsøkir: hydrokarbonlekar, hendingar við

brunnunum og skip sum eru á vandaleið. Og fyri at fáa hetta arbeivi at rigga, so eru allir partar av oljuvinnuni við í hesum trygdararbeiðnum.

- Vit hava eitt felags mál sum er at norski landgrunnurin skal vera so tryggur sum gjørligt. Hendir ein vanlukka, so rakar hetta umdømi hjá okkum øllum í vinnuni. Tí eru vit eisini nøgd við hesa kanningina, ið vísir at vit eru á rættari leið við hesum trygdararbeiðnum. Men hetta merkir ikki at vit kunnu seta okkum niður og vera nøgd. Tað gera vit ongantíð ta talan er um trygd, sigur Aud Nistov.

*Frágreiðingin sum bleiv løgd fram í gjár kann lesast á hesi leinkjuni: Kanning av trygdini á norska landgrunninum*

*Ein stuttfilmur er gjørdur um trygdararbeiðið, og hann kann ein síggja her: Hvat er RNNP*